# Lítil mótahandil við stórum úrvali



- Mong ristu við høvdinum, tá eg lat upp handilin. Men tað hevur so borið til líka til nú, sigur Brynja Trondesen

**Einasti mótahandilin í Sandoynni liggur í Skálavík. Her ber til at keypa tær nýggjastu vørurnar – ja, sjálvt heystmótin anno 2005 hongur frammi her. – Eg royni at vera bíligari enn handlarnir í Havn, sigur eigarin Brynja Trondesen**

KLÆDNAHANDIL
*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Skálavík:** Ein leygardag fyri skjótt 21 árum síðani fór ein hending fram í Skálavík, sum nógv varð tosað um.

Henda dagin lat nevniliga á fyrsta sinni upp ein mótahandil í bygdini. Mong ivaðust í hesum, men Brynja Trondesen hon trúði uppá tað.

- Og í dag kann eg so bara staðfesta, at tað hevur gingið higartil, sigur hon, í tí at hon letur upp dyrnar til enn ein dag í handilslívinum á Sandoynni.

Talið at kundum er rættiliga ójavnt, onkran dagin kunnu teir bert vera einir tveir-tríggir. Men til aðrar tíðir kunnu gott vera eini 20 fólk á gátt í hesum einasta mótahandlinum í Sandoynni.

Kundarnir í handlinum koma úr allari oynni, og eisini úr øðrum pørtum av landinum.

- Serliga nógv er at gera um vikuskiftini, sigur Brynja.

### Bar til

Brynja Trondesen hevur svarið klárt, tá vit spyrja hana um, hví í víðastu verð hon byrjaði ein klædnahandil í Skálavík.

- Eg arbeiddi eina tíð á flakavirkinum í Skopun, men hevði so hug at royna okkurt heilt annað.

- Ja, hví ikki lata upp ein handil við mótaklæðum her í bygdini?! Eg ætlaði bara at vita um tað yvirhøvur bar til, sigur Brynja.

Og tað bar til hjá henni - og ber framvegis til, nú tað fer at nærkast til 21 ára dagin fyri upplatingini – henda minniliga dagin, 29. september í 1984.

Ein annar klædnahandil hevur verið í Skopun, men í løtuni er Klædnabúðin í Skálavík einasta staðið í Sandoynni har til ber at keypa mótaklæðir.

### Heystmótin

Hóast hesin mótahandilin heldur til í einum kjallara, so hevur tað als onga ávirkan á úrvalið av klæðum.

Í løtuni hongur heystmótin frammi, og her sæst at jakkar við skinni eru komnir fram aftur. So her er Klædnabúðin í Skálavík við uppá mótan.

Hon hevur í løtuni bert klæðir til yngri og tilkomin konufólk. Eitt skifti seldi hon eisini klæðir til mannfólk, men gavst við hesum í fjør.

- Klæðini til mannfólk kravdu so nógv pláss, so eg gavst bara við tí, sigur hon. Sovítt tað er gjørligt so roynir hon at halda seg til rímiligar prísir - í øllum førum soleiðis, at hon helst skal liggja nakað niðanfyri prísirnar í høvuðsstaðnum.

### Ristu við høvdinum

Brynja, sum upprunaliga er ættað úr Havn, flutti suður í 1977.

Og tá hon bar uppá mál um ætlanir sínar við handlinum merkti hon týðiliga, at her mundi hon vera farin langt av leið.

- Tað vóru mong sum ristu við høvdinum at mær. Í dag dugi eg væl at skilja at tey gjørdu tað, men tað hevur so gingið síðani, sigur hon.

Handilin byrjaði jú í eini tíð, tá tað byrjaði at ganga búskaparliga væl í Føroyum.

Men hinvegin so merktu tey meiri slaku 90 árini eisini søluna í Klædnabúðini.

### Dryppar á handilin

Á Sandoynni eru í løtuni nógv fólk í arbeiði á teimum báðum flakavirkinum hjá Sandoy Seafood.

Virksemið innan fiskivinnuna er alpha og omega hjá fólki í oynni. Gongst væl, so hevur fólk nógvan pening um hendi - og øvugt.

Hetta hevur Brynja eisini sæð í søluni av klæðunum hjá henni. Tað er nærum sum við orðatakinum: Regnar tað á fiskivinnuna, so dryppar tað eisini á handilslívið í oynni.

Hóast fólk tosa um ein ávísan steðg í búskaparliga vøkstrinum, so hevur hon framvegis havt úr at gera í summar.

Hon hevur kortini ikki tær stóru útreiðslurnar til leigu, tí handilin heldur til í kjallara hennara. Sjálv er hon eisini nógv í handlinum, men hevur eina hjálp aftrat sær.

Handilin letur upp kl. 10 á morgni og er vanliga opin til kl. 17, fríggjadag tó til kl. 18. Leygardag er opið frá kl. 10 til 14.



*Hon selir bara klæðir til kvinnur. Heystmótin í ár hongur eisini frammi*

# Nútíðar samskifti við kristnari lívshugsjón

**Sørvágur:** *Hevur nútíðar samskifti og kristin lívshugsjón nakað við hvørt annað at gera?!*

- Jú, siga samskiparararnir av einum serstøkum Teleios-skeiði - hjúnini Elsa og Tummas í Garði - sum verður hildið í missiónshúsinum í Sørvági seinast í oktober mánaði.

Teleios er navnið á eini skeiðsrøð, sum byggir á eina samanrenning av nútíðar samskiftissálarfrøði og teirri kristnu lívshugsjónini. Skeiðið miðar eftir at geva luttakarunum eina betri fatan av teimum viðurskiftum, sum ávirka samskifti teirra við onnur.

Endamálið við skeiðnum er tí at læra luttakararnar, hvussu ein lurtar eftir og hjálpir øðrum uttan sjálvur at gerast útbrendur. Dentur verður eisini lagdur á at uppliva sunnar relasjónir við familju, vinir, starvsfelagar og samkomur.

Kostnaðurin fyri hetta vikuskiftisskeiðið, sum verður 21. til 23. oktober, er 700 kr. Tekning fer fram hjá stigtakarunum.

**sb.**

# Reglugerð um tyrluflúgving yvir bygdini



*Ein reglugerð er nú gjørd um, hvussu berast skal at, tá tyrlur flúgva við farmi í Vestmanna*

**Vestmanna:** Ein reglugerð er nú gjørd fyri tyrlurnar, tá tær eru í arbeiðsørindum í Vestmanna.

Kommunan hevur ásannað, at tað er trupult at seta ávíst øki burturav til tyrluna, tá hon er í arbeiðsørindum í Vestmanna, verður sagt úr kommununi.

Tí hevur kommunan í samráð við Tyrlutænastuna gjørt nakrar reglur um, hvussu farast skal fram í samband við hetta.

Fyrsta punktið er, at Tyrlutænastan í góðari tíð boðar kommununi frá, tá flúgving er fyri framman í Vestmanna.

Eitt annað av punktunum er, at tá tyrlan skal lenda ella krøkja í og úr, so skal hetta sovítt gjørligt gerast uttanfyri bygt øki.

**sb.**